# Ov dýrt at umvæla Hercules

**Enn er einki gjørt við Hercules. Tilboðini sum reiðaríið hevur fingið higartil, hava verið ov dýr**

SKIPASMÍÐ
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*





*Hercules fórst illa av eldinum og er lítið annað enn ein skrokkur við motori og róðri*

Partafelagið Framherji hevur fingið fleiri tilboð upp á arbeiðið at umvæla og endurbyggja verksmiðjutrolaran Hercules, sum fórst illa av eldi í fjør, og sum felagið keypti seinasta heyst frá Tryggingarfelagnum Føroyar fyri 35 milliónir krónur. Skipið liggur í Kili, og reiðaríið fekk tilboð frá skipasmiðjum har og í øðrum londum, men øll vóru í hægra lagi, sigur reiðarin, Anfinn Olsen.

Hercules fórst ógvuliga illa av eldinum, sum eisini kostaði tólv av manningini lívið. Síðani eigaraskiftið er skipið ruddað. Tað arbeiðið tók rættiliga langa tíð og varð millum annað darvað av átrúnaðarligu viðurskiftunum hjá teimum, sum doyðu í eldinum. Hetta gjørdi eisini, at myndugleikarnir høvdu sera neyvt eftirliut við arbeiðinum.

### Skrokkur og motorur

Í sambandi við ruddingina er alt jarnið, sum var farið av tí nógva hitanum, skorið burtur, so í dag er Hercules lítið annað enn ein skrokkur við motori og róðri. Millum 700 og 800 tons av tungolju vóru umborð á Hercules, tá eldur kom í skipið, og fyri at fáa hana upp úr skipinum mátti oljan hitast.

Anfinnm Olsern sigur, at ætlan er at royna at fáa eitt óskandi tilboð upp á arbeiðið at umvæla og endurbyggja Hercules, sum eftir ætlanini skal í somu vinnu, sum tað var í undan eldsbrunanum. Tá fiskaði skipið í Kyrrahavinum, men tað kann hugsast, at tað eisini fer at royna aðrastaðni, tá tað fer aftur til fiskiskap.

# Faroe Petroleum nýtt og spennandi oljumið

**Faroe Petroleum eigur fjórðingin av loyvunum á oljumiðinum Fat Cat í Norðsjónum**

OLJUVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Graham Stewart er forstjóri í Faroe Petroleum*

Faroe Petroleum hevur fingið avtalu við oljufelagið Petro Canada um at leggja saman tvey loyvir. Talan er um loyvini P.1459 og P.1404, sum eru í bretska partinum av Norðsjónum eystan fyri Blake framleiðslueindina. Oljumiðið á hesum báðum loyvum verður nevnt "Fat Cat". Oljufelagið Amoco boraði ein brunn á hesum miðinum í 1981 og bar við kolvetni.

Eftir at samanleggingin er góðkend, er loyvisbýtið fylgjandi: Petro-Canada UK Limited (Fyristøðufelag) 45 prosent, Faroe Petroleum (U.K.) Limited 25 prosent, Elixir Petroleum (UK) Limited12,5 prosent, Granby Enterprises Limited 12,5 prosent og Reach Exploration (UK) Limited 5 prosent.

Faroe Petroleum eigur sum nevnt 25 prosent av loyvunum, men hevur gjørt avtalu við oljufelagið First Oil um, at teir kunnu keypa 12,5 prosent frá Faroe Petroleum. Hetta er ein avtala, sum varð gjørd við First Oil í 2007, tá ið Faroe Petroleum keypti 18.75 prosent av Wissey gasskelduni frá First Oil. Framleiðsla byrjar væntandi á Wissey í august í ár.

### Spennandi mið

Graham Stewart, forstjóri á Faroe Petroleum, hevði hesa viðmerking:

- Fat Cat er eitt sera spennandi prospekt, og av tí at ein brunnur longu hevur staðfest, at kolvetni eru til staðar, er váðin lækkaður munandi. Fat Cat liggur nær við kolvetnisrørleiðingar, og Petro Canada, sum er fyristøðufelag, hevur góðar royndir á økinum, sigur forstjórin í Faroe Petroleum, Graham Stewart, í einari viðmerking.

Forstjórin sigur, at seismikkurin yvir prospektið er longu fingin til vega, og so skjótt sum úrslitið fyriliggur, verður avgerð tikin, um borast skal á loyvunum. Hesin brunnur gerst sostatt møguliga ein partur av boriætlanini hjá Faroe Petroleum, sum í seinnu hálvu av fevnir um East Breagh, West Breagh, Marsvin, South East Thor og Hyme, sigur Graham Stewart.

## Fáa nógva sild

Tey føroysku sildaskipini hava havt góðan fiskiskap norðanfyri. Skipini fóru út at leita beint fyri ólavsøku, og síðani tey raktu við sild í síðstu viku, hava fimm teirra fingið last.

Finnur Fríði, Tróndur í Gøtu og Jupiter eru á veg inn at landa umleið 2.500 tons í part. Tey verða inni í morgin, men fyrrapartin varð ikki endaliga avgjørt, hvar tey skuldu landa.

Fagraberg og Høgaberg, sum samtrola, hava lanað ávikavist í Fuglafirði og í Íslandi. Teir høvdu fulla last.